# Grillkvøld, sangur og midnáttar-samkoma

**Ein tíma eftir, at teir fyrstu bitarnir av leskiligum og vælkryddaðum mati eru farnir á grillirnar, fara Sámal Ravnsfjall og Ronnie Nielsen at syngja. Síðan verður felagssangur, og at enda fer Torbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, at halda midnáttarrøðu**

Fjarðastevna
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið verður stórt grillkvøld á økinum sunnanfyri fótbóltsvøllin á Skála. Tiltakið, sum er ein partur av skránni fyri Fjarðastevnuna, byrjar klokkan 19.30.

Fyrireikararnir siga, at fleiri grillir verða settar upp á økinum, og ætlanin er, at gestirnir sjálvir skulu grilla matin.

- Neyðugt verður tó ikki at hava mat við sær, tí leskiligur og vælkryddaður grillmatur og okkurt leskandi verður selt á staðnum.

Borð og benkur verða sett upp á økinum, og her kunnu fólk sita í friði og náðum og njóta ein góðan bita.

### Súklur og bátar

- Grillkvøldið á Skála snýr seg tó ikki bara um mat, tí umframt góða matin, verður eisini skipað fyri sangi og røðum, tá ið líður út á kvøldið.

Fyri at geva tiltakinum ein serstakan dám, hava fyrireikararnir boðið gestum uttanífrá at verða við.

- Vit hava sett okkum í samband við Føroya MC-felag, sum eftir felagstúr til Oyndarfjarðar og Elduvíkar, kemur á vitjan á motorsúklum.

Fyrireikararnir hava eisini boðið bátafeløgum at verða vælkomin til tiltakið.

- Vit vóna, at fleiri bátar og fólk á motorsúklu koma at vitja okkum leygarkvøldið og soleiðis verða við til at seta sín dám á tiltakið.



*Tað verður Torbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, sum heldur midnáttarrøðuna leygarkvøldið*

### Sámal og Ronnie

Umleið ein tíma eftir, at fyrstu bitarnir av leskiligum kjøtmati eru farnir á grillirnar, fara teir báðir vælumtóktu, Sámal Ravnsfjall og Ronnie Nielsen, at syngja. Tá ið teir hava sungið í ein hálvan tíma ella so, verður felagssangur, har øll kunnu syngja við.

Tá ið kvøldið líður, og klokkan nærkast ellivta tíma, fer løgtingsmaðurin, Torbjørn Jacobsen, at halda midnáttarrøðu.

Samdur ella ei við mannin og tað, sum hann stendur fyri, skerst ikki burtur, at Torbjørn Jacobsen er orðasnillingur sum fáur. Hann dugir sera væl at bera fram røður – og tað er altíð stuttligt at lurta eftir honum.

### Country-dansur

Á midnátt leygarkvøldið verður dansur í Ítróttarhøllini, og tá fer væl umtókti Countrybólkurin at spæla.

Fyrireikararnir vænta, at dansurin fer at vara til einaferð út ímóti morgni.

- Vit vænta eitt gott og hugnaligt kvøld og nógv fólk á Skála leygarkvøldið og sunnunáttina, siga tey sum varða av Fjarðastevnuni.



*Tað verður Jógvan Fríðriksson, prestur, sum fer at prædika í Skála kirkju sunnudagin. Eisini verða møtir í missiónshúsinum og í Nireja*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Jógvan Fríðriksson prædikar

**Møtir verða í Missiónshúsinum og í Nerija, og gudstænasta verður í Skála kirkju**

Fjarðastevna
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er eingin stevna uttan, at tann andaligi parturin – so ella so – eisini er við, og soleiðis verður eisini á Fjarðastevnu um vikuskiftið.

Sunnudagin klokkan 11 verður gudstænasta í Skála kirkju, har Jógvan Fríðriksson, prestur, prædikar.

Jógvan dugir væl at gera eina gudstænastu áhugaverda og livandi, og einki er at ivast í, at soleiðis verður eisini sunnudagin.

### Møtir

Tað verður ikki bara í kirkjunu, at guds orð verður at hoyra um stevnuna.

Møtir verða eisini í missiónshúsinum og í Nerija.

Fríggjakvøldið klokkan 20 verður junior-møti í missiónshúsinum, leygarkvøldið klokkan 20 verður ungdómsmøti, og síðan verður møti aftur sunnukvøldið klokkan 19.

Í Nerija verður familjumøti sunnumorgunin klokkan 11.

# Bassaprix og dansishow í Ítróttarhøllini á Skála

**Ungar dansigentur av Toftum og ungir dansarar úr Havn fara eisini at vísa dansikynstur**

Fjarðastevna
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fríggjakvøldið verður eitt fjølbroytt barna-og ungdómstiltak í Ítróttarhøllini á Skála. Tiltakið verður rópt bassaprix og dansishow.

Fyrireikararnir av Fjarðastevnu siga, at bassaprix'ið verður skipað á tann hátt, at børn úr 1. flokki til og við 7. flokk fáa høvi at velja sær eitt lag at syngja. Tá ið so øll hava sungið, verður ein vinnari kosin, sum fær eitt gávukort á 300 krónur.

- Tey, sum ynskja at verða við í kappingini, skulu tekna luttøku hjá Elly á tlf. 257019, siga tey á Skála.

### Nósavinnarin

Umframt sangkappingina, verður eisini høvi at hoyra "nósavinnaran" í 2004, Ingibjørg Hansen, við síni framúrskarandi rødd.

Ungar dansigentur av Toftum fara at undirhalda við dansi, og ungir havnamenn fara eisini at vísa dansikynstur við break-dansi.

## Vælkomin!

Feløgini, sum skipa fyri Fjarðastevnuni, bjóða øllum at vera hjartaliga vælkomin á Skála